


# Sáttmáli um nýbygning skrivaður

**P/F Tórshavnar Skipasmiðja og P/F Malinsfjall við Bjarna Kass í Tórshavn, hava í dag skrivað undir sáttmála um at smíða ein nýggjan trolara til landleiðina**

NÝBYGNINGUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Trolarin er 21,3 metrar langur og 5,75 metrar breiður. Hann fær ein 499 HK motor og lastar 610 kassar. Trolarin er av sama slag sum Hansa Maria og Skálafossur, sum Skipasmiðjan smíðaði til Toftir og Vestmanna í 2005.

- Fyri at verða kappingarfør í prísi verður skrokkurin smíðaður í Pólandi, meðan restin av arbeiðinum verður gjørt í Havn. Trolarin skal eftir ætlan latast reiðaríinum flaggdagin 2007, sigur Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju.

Skipasmiðjan fegnast um, aftur at fáa ein nýbygning at gera, soleiðis at førleikin hjá monnunum at smíða og útgera skip verður varðveittur her á landi.

Tekning av trolaranum er at síggja á heimasíðuni hjá Skipasmiðjuni: www.faroeyard.fo



# Urgukonsertir við Jóannes Nolsøe

KONSERT

Vágbingurin Jóannes Nolsøe heldur 4 urgukonsertir í Føroyum í summar.

Síðani í september í 1997 hevur Jóannes starvast sum urguleikari í Hulsig og í Skagen í Norðurjútlandi. Urguleikaraútbúgvingina tók hann í Keypmannahavn og í Tróndheimi í Noregi. Hann hevur eisini tikið lut á urguskeiðum í tíðini, hann hevur búleikast í Danmark.

Konsertskráin á Føroyavitjanini fevnir um barokktónleik, wienarklassiskan tónleik og tónleik úr okkara tíð.

– Nú Mozartárið er hálvrunnið kann nevnast, at hansara tónleikur eisini er umboðaður á skránni. Jóannes Nolsøe leggur fyri við urgukonsert í F-dur (Op. 4) hjá G. F. Händel, skipað fyri urgusolo. Úr skránni kann eisini nevnast verkið variasjónir yvir norska fólkalagið »Å, hvor salig det skal blive«.

Konsertirnar verða hildnar á hesum støðum: 20. juni kl. 20.00 í Sandavágs kirkju. 22. juni kl. 20.00 í Vágs kirkju. 29. juni kl. 20.00 í Vesturkirkjuni. 2. juli kl. 16.00 í Fuglafjarðar kirkju.

# Heilsa, trygd og umhvørvi á dagsskránna

**Í vikuni skipar Føroya Shell fyri einum trygdarátaki fyri starvsfólki og fólki uttani frá. Tiltakið Føroya Shell skipar fyri, er partur av einum heimsumfatandi átaki, har Shell setur heilsu, trygd og umhvørvi á hásæti**

HEILSUÁTAK
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



Shell ynskir fólk verða meira tilvitaðið um heilsu, trygd og umhvørvi, og tí hevur felagið sett hesi evni ovast á breddan hesa vikuna. Byrjað var í morgun klokkan átta, har barnagarðsbørn í Føroyum fingu eitt pappír við, har tey kunnu tekna og litað og verða partur av heislutrygdarvikuni hjá Shell.

Klokkan níggju vóru starvsfólkini hjá Føroya Shell kring landið kunnaði um vikuna, og har fingu tey millum annað fetmátarar útflýggjaðar. Tey skulu ætlandi kappast sínamillum um, hvør teirra hevur gingið flest fet, tá vikan er liðug.

Ein annar partur av átakinum er, at Hjartafelagið heilsukannar starvsfólkini hjá Føroya Shell, og verða kanningarnar gjørdar gjøgnum vikuna.

Men hvat fær Shell so burtur úr hesum? Hákun Djurhuus, stjóri á Føroya Shell sigur, at tað er kravt av Shell-feløgunum kring knøttin at vísa stórt fyrilit fyri heilsu, trygt og umhvørvi. Tað er eitt gott tekin at senda brúkaranum, at vit hava sunn og frísk starvsfólk, og tað gevur avkast á so nógvum økjum. Millum annað eisini á sjúkradøgunum, segði Hákun Djurhuus á tíðindafundinum uppi á Hotel Føroyum í morgun.

### Øll sleppa við

Men heilsuátakið er ikki fyri starvsfólk hjá Føroya Shell burturav. Týsdagin verður skipað fyri heilsurenning í Gøtudali klokkan sjey. Hetta er eitt alment tiltak, og tað sama er gongutúrurin í Eysturoynni, sum verður hósdagin.

- Við at gera tiltøkini almenn so fáa vit eisini vanliga føroyingin uppí. Og tað er ongin loyna, at eitt av málunum við átakinum, er, at fáa føroyingar sum heild at verða meiri tilvitaðar um heilsu, trygd og umhvørvi. Og við at fáa onnur enn bert starvsfólk á Shell upp í tiltakið, so leggja vit eisini eitt størri trýst á okkum sjálvi, har vit vísa, at vit veruliga meina tað, sigur Hákun Djurhuus.

Hann vísir eisini á, at átakið stuðlar undir heilsuskránna hjá landsstýrismanninum almanna- og heilsumálum, Hans Paula Strøm, og 0-hugsjónina hjá Ferðslutrygd, og sipar hann millum annað til, at tað er bannað starvsfólkum hjá Shell at tosa í fartelefon meðan tey koyra í arbeiðsørindum.

Átakið endar fríggjadagin, har øll starvsfólk hjá Føroya Shell hittast á Hotel Føroyum til fyrilestrar og framløgur av úrslitum frá vikuni, umframt at vinningar og virðislønir verða býttar út til tey, sum hava gingið flest fet og onnur.